# Aftur omanlop í Bø

## Mikunáttina fór ein stórur steinur á rull oman úr líðini í Bø, og mikudagin leyp aftur

Randi Jacobsen

Tá ið Búi Holm bygdi í Bø, var hann greiður yvir, at omanlop kundi henda, so bratt tað var oman fyri húsini.

Tí er hann einki serliga kløkkur av teimum báðum lopunum, sum vóru ávikuavist mikunáttina og seint mikudagin.

Hann vaknaði mikunáttina, tá ið ein stóru steinur kom oman móti húsum hansara, fór upp um landsvegin og endaði á kommunala vegnum. Búi Holm gav sær ikki far um, hvat var hent, men legði seg bara aftur.

Um hálvgum fýra tíðina vaknaði hann aftur av maskinunum hjá Landsverki, sum tó ikki fluttu steinin burtur. Steinurin er mettur at viga 7-9 tons.

Búi Holm sigur, at eingin veit at siga um so stórt lop áður.

Mikukvøldið leyp aftur í sama stað, og tá kom minni grót oman, men onkur stórur steinur var uppií.

Landsverk er farið at kanna, um vandi er fyri fleiri lopum.

*randi@sosialurin.fo*



*Tað hevði ikki verið lukkuligt, um stóri steinurin var bóltaður longri oman*

# Kennast ikki við tjóvin

## Sjálvt um upptøkan av tjóvarínum í handlinum Expert í Havn herfyri vísti andlitið av manninum, og upptøkan lá í fleiri dagar á Vágaportalinum, er kriminalpolitiið framvegis ikki komin nakran veg í arbeiðinum at finna tjóvin

Randi Jacobsen

Fyri tveimum vikum síðan tók kriminalpolitið óvanliga stigið at leggja eina videupptøku av einum manni, sum stjól eina farteldur í handlinum Expert í Havn, út á Vágaportalin.

Ætlanin var at fáa upptøkuna í sjónvarpið hjá kringvarpinum, men sjónvarpsleiðslan aftraði seg við at spæla við, orsakað av ákoyringum fyri eina líknandi tænastu, sum kringvarpið gjørdi fyri politiið.

Upptøkan, sum í fleiri dagar lá á Vágaportalinum, vísti ein ungan mann, sum fór inn í handlin, tók eina farteldu og haraftrat eina mús.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini sigur, at politiið enn ikki hevur fingið nakað ítøkiligt burtur úr at leggja uptøkuna út á portalin.

### Eitt tipp

Bara eitt fólk hevur enn vent sær til politiið. Tað tippið er ikki eftirkannað enn.

Dátueftirlitið hevur onga viðmerking til mannagongdina hjá kriminalpolitinum.

Bergleif Brimvík sigur, at henda mannagongd ikki hevur verið so nógv brúkt í Føroyum sum í Danmark, og tað kemur av, at eingin áseting er í føroysku rættargangslógini um hetta.

Men tað er greitt, at hetta ikki kann gerast, uttan so at gerðin stendur mát við revsirammuna. Í hesum førinum er revsiramman fyri slíkan stuldur hálvt annað ár, sigur Bergleif Brimvík.

Kriminalpolitiið er framvegis áhugað í at frætta frá fólki, sum halda seg hava kent tjóvin aftur.

Áðrenn upptøkan varð løgd á Vágaportalin, varð hon løgd á innanhýsis skipanina hjá politinum í Føroyum. Øll starvsfólkini høvdu møguleikan at síggja upptøkuna, men tað gav einki.

# Innrás av flogmús

## 1964 varð fyrsta flogmúsin skrásett í Føroyum, og í ár hava verið fleiri hundrað flogmýs her. Løgið, heldur fuglamaðurin

Randi Jacobsen

Javnan frættist nú úr bygum og býum, at fólk hava sæð flogmýs. Summi hava sæð fleiri sama kvøld.

Jens-Kjeld Jensen, fuglafrøðingur hevur einki svar uppá, hví flogmúsin eftir fáum árum er blivin so vanlig í Føroyum.

Tann fyrsta flogmúsin í Føroyum varð skrásett í 1964, árini aftaná varð bara sædd ein um árið, men ikki hvørt ár. Seinastu 10 árini hevur flogmús verið at sæð á hvørjum ári, og í ár eru heilt nógvar.

- Tá ið eg veit um einar fimtan flogmýs í Føroyum í ár, hava helst fleiri hundað flogmýs verið her, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Tað er ov lætt at geva veðurlagsbroytingunum skyldina, tí eingi prógv eru fyri tí, heldur fuglafrøðingurin.

Flogmýsnar síggjast fyri tað mesta undir lyktasteyrum. Tær flúgva runt og leita eftir skordjórum, tí hjá teimum ræður um at metta seg, áðrenn tær fara í dvala. Men líti av føði er at finna, so tað endar helst við, at tær svangar seta seg at sova – og vakna ongantíð aftur.

*randi@sosialurin.fo*

# Hittast aftur í næstu viku

## Sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum gongu út hóskvøldið, men so leingi samráðingarnar ganga, verður eingin arbeiðssteðgur

Randi Jacobsen

Hóast samráðingarnar millum Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevararafelagið øðrumegin og almenna Fakfelagssamstarvið ikki eru komnar á mál, er eingin, sum enn tosar um arbeiðssteðg.

Í Fakfelagssamstarvinum ru fimm feløg, sum hava felags samráðingar, og tey eru Starvsmannafelagið, Føroya Pedagogfelag, Føroya Lærrafelag, Føroyskr Sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Samráðingarnir, sum byrjaðu í mai, vórðu lagdar soleiðis til rættis, at fyri summarferiuna vórðu felags krøvini løgd fram, og serkrøvini komu hálvan august.

Tá ið fundir eru um felags krøvini, eru bara formenn – og forkvinnur við vegna fakfeløgini, og tá ið er serkrøvini eru fyri, møta nevndirnar í hvørjum felag sær á fundi.

Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum vil einki siga, hvussu tað gongur at smráðast, ella hvussu líður.

Sáttmálarnir gingu út á midnátt hóskvøldið, men so leingi samráðst verður, verður arbeitt eftir gomlu sáttmálunum.

*randi@sosialurin.fo*